

ókeypis

Fá ein kalendara fyri 2010

Kom og fá ein snøggan kalendara fyri 2010 at heingja á veggin. Kalendarin fæst í øllum Samkeypshandlum, Fasthandlum og á skrivstovuni hjá ALS á Tinghúsvegi í Havn. Kalendarin er til øll og er ókeypis.

- Serføroyskir dagar
- Altjóða dagar
- Nær stevnur eru
- Nær fuglarnir koma
- Nær loyvt er at veiða
- ALS dagar o.a.



Avmarkað nøgd

Starv.fo er ein portalur, har virkir og stovnar søkja eftir fólki, og tey, sum søkja starv, skráseta seg við førleikum, royndum og áhugamálum. Legg leiðina inn á starv.fo fyri at síggja, hvat vit kunnu gera fyri teg.

fast: SAMKEYP starv.fo

tín slóð til dreymastarvið

sansir.fo

# ÚTBJÓÐING AT LISTPRÝÐA NÝGGJA SKÚLAN Á HAMRINUM Á ARGJUM

**Tórshavnar kommuna hevur samtykt, at 1,5% av byggikostnaðinum skulu brúkast til at listprýða nýggjar bygningar hjá kommununi.**

Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu hevur avgjørt, at øll listafólk hava møguleika at koma við uppskoti at listprýða skúlan á Hamrinum á Argjum.

Listabólkurin ynskir, at listin í nýggja skúlanum á Hamrinum verður fjølbroytt, har fleiri listagreinar kunnu verða umboðaðar, og at listin fevnir um allan skúlabygningin.

Listabólkurin hevur, saman við arkitektunum, í huga teir mongu glasveggirnar í skúlanum sum ein eyðsýndan møguleika at listprýða. Tó útihýsir hetta ikki aðrari list ella øðrum góðum hugskotum.

Í hesum sambandi skal Listabólkurin gera vart við, at talan verður um listaverk, sum verður í skúlaumhvørvi, har nógv fólk fer at ferðast, og tí skal dentur verða lagdur á, at listaverkið skal taka seg væl út í tíðini frameftir. Hetta eigur at verða havt í huga, tá uppskotini verða gjørd.

### ÚTBJÓÐING

Leisturin fyri útbjóðingina verður soleiðis:

- Listafólk lata skitsuuppskot inn við frágreiðing um listaverkini. Í uppskotinum skal upplýsast, hvør kostnaðurin verður íroknað uppseting av listaverkunum. Afturat hesum skal neyvt útgreinast, hvat tilfar verður nýtt til listaverkini.
- Upplýsast skal, at listaverk á glasveggjunum skulu vera liðug 1. apríl 2010. Onnur listaverk skulu vera liðug og uppsett í seinasta lagi 1. apríl 2011.
- Listabólkurin skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu uppskotini ella einki at taka.
- Tá Listabólkurin hevur tikið avgerð um, hvør verður biðin at gera listaverkið, verður sáttmáli gjørdur við viðkomandi listafólk, har m.a. treytir fyri avhending, uppseting, kostnað og aðrar treytir verða ásettar.
- Uppskotini skulu vera Listabólkinum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2010. Um uppskot koma inn eftir ásettu freist, verður sæð burtur frá teimum.

### KUNNING

Bjóðað verður til kunningarfund í Posthúskjallaranum hósdagin 17. desember kl. 17, har arkitektarnir og Listabólkurin greiða frá verkætlanini. Dagin eftir kl. 13 verður rundvísing á skúlanum, sum MAP Arkitektar skipa fyri. Tilfar um skúlan verður útflýggjað á fundinum. Annars kann tilfar fáast frá MAP Arkitektum, Jónas Broncks gøtu 5, Tórshavn, til 6. januar 2010.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi, eru tygum vælkomin at venda tygum til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA